# KONFIRMATIÓNIRNAR VÁRIÐ 2021

**TIL KONFIRMANTIN**

Hey!

Skalt tú konfirmerast komandi vár?

Um svarið er "Ja", skalt tú nevniliga byrja at ganga til prest nú. Tað er spennandi ☺ Vit prestar gleða okkum og vóna, at tú eisini gleðir teg.

Tað fyrsta, tú skalt gera, er at geva foreldrunum hetta pappírið, tá ið tú kemur heim frá skúla í dag.

Síðani fert tú at fáa boð frá tínum presti, nær og hvar tú skalt møta fyrstu ferð.

Vit síggjast!

**TIL FORELDRINI**

Góðu foreldur!

Um tykkara barn skal konfirmerast várið 2021 í Vesturkirkjuni, Argja kirkju ella Kirkjubøar kirkju, skal tað byrja at ganga til prest hetta hálvárið. Tað verður hvønn týsmorgun kl. 8.00-9.30.

Konfirmatiónirnar verða:
21. mars í Vesturkirkjuni. Derhard Jógvansson er prestur.
21. mars í Kirkjubøar kirkju. Bergur Debes Joensen er prestur.
28. mars í Vesturkirkjuni. Bergur Debes Joensen er prestur.
28. mars í Argja kirkju. Derhard Jógvansson er prestur.

Tey, sum Derhard skal konfirmera, fara at ganga til prest í Argja kirkju. Tey, sum Bergur skal konfirmera, fara at ganga til prest í Vesturkirkjuni.

Vit hava brúk fyri fylgjandi upplýsingum, sum tit senda talgilt til: derhard@kirkjan.fo.

1. Mynd av dóps-/navnabrævi hjá konfirmantinum. (Einfaldast at nýta fartelefonina... ☺)
2. Øll fornøvn, millumnavn og eftirnavn hjá konfirmantinum.
3. Bústaður (Gøta, nummar, bygd/bý).
4. Fartelefonnummar hjá konfirmantinum, mammuni og pápanum.
5. Føðingardagur hjá konfirmantinum.
6. Navnið á skúlanum, konfirmanturin gongur á.
7. Hvønn dag konfirmatiónin skal verða og í hvørjari kirkju.

Skrivið *Konfirmantur* sum evni fyri teldupostin, tá ið tit senda.

Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

Vit gleða okkum at hitta nýggju konfirmantarnar ☺

Vinarliga,
Bergur Debes Joensen og Derhard Jógvansson